*Hóast samgongan varð bjargað leygardagin, er ikki vist, at hon hevur riðið stormin av. Løgmaður skal nú saman við restini av flokkunum finna eitt nýtt uppskot um sjálvstýrisleist, sum allir flokkarnir taka undir við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Samgongustríðið stendur við

**Hóast samgongan varð bjargað leygarkvøldið, er framvegis stríð í samgonguni. Teir tríggir samgonguflokkarnir skulu í hesi vikuni finna eina nýggja semju um ein nýggjan sjálvstýrisleist, sum teir í verandi støðu eru grundleggjandi ósamdir um. Harafturat kann spurningur setast við, um samgongan hevur mist sítt trúvirði**

ANALYSA
*John Johannessen*

Samgongustríðið er ikki av, men útsett.

Hetta kom týðuliga til sjóndar í beinleiðis kjakinum í Sjónvaprinum beint eftir tingfundin leygarkvøldið, tá Høgni Hoydal bakkaði fyri Anfinni Kallsberg og harvið bjargaði samgonguni.

Teir tríggir samgonguflokkarnir eru heilt einfalt ikki samdir um politikkin viðvíkjandi framtíðar ríkisrættarligu støðu Føroya.

## Samgongan í respirator

– Vit kunnu siga, at samgongan hevur ligið í respirator, og eg valdi ikki at vera tann, ið tók stikkaran út. Møguliga kann samgongan vakna aftur og sleppa úr respiratorinum, men tað sær svart út, segði Høgni Hoydal í kjaksendingini.

Álitið millum teir tríggir samgonguflokkarnar er nevniliga rokið eftir drúgvu innanhýsis telvingina í samgonguni síðani samráðingarnar við donsku stjórnina slitnaðu 26. oktober í fjør.

Samgonguflokkarnir hava áhaldandi stríðst við hvønn annan og skiftst um at melda út hvør sína hugsan um leiðina fram at føroyskum fullveldi. Hetta hevur verið ein leikur, ið javnan hevur mint um eitt valstríð.

Ofta hevur verið lukkað land í Tinganesi, meðan samgonguflokkarnir hava telvað innanhýsis um, hvussu ein sjálvstýrisleistur skal leggjast til rættis. Tá semja er funnin, hevur landsstýrið sligið málið stórt upp og meldað út við stórum orðum á tíðindafundum, sum eru sendir beinleiðis um alt landið gjøgnum útvarp og sjónvarp.

Síðani hevur verið friður eina løtu, til ein skeiv útmelding frá einum av samgonguflokkunum, ein veljarakanning ella ein útmelding frá danska forsætisráðharranum hevur skapt grundarlag fyri nýggjari telving.

Tá nýggj semja síðani er funnin, hevur mannagongdin verið tann sama. Nýggjur tíðindafundur og stórar yvirskriftir, har greitt hevur verið frá, hvussu samdir samgonguflokkarnir eru. Men so er aftur vátt komið í reiðrið, tá onkur aftur er komin við einari skeivari útmelding.

## Skulu aftur telva

Í farnu viku bar ikki til at telva innanhýsis, uttan at pressan kom uppí. Samgongan var nú so nær við at slitna, at flokkarnir høvdu brúk fyri at gera vart við hugsanir sínar í pressuni fyri at leggja trýst á hvønn annan.

Hóast nógvar royndir, varð eingin semja funnin.

Høgni Hoydal bjargaði tó samgonguni við at taka aftur uppskot síni um bundnan sjálvstýrisleist og um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga. Men hetta merkir kortini ikki, at samgongan nú er samd og kann halda fram at virka, sum einki var hent.

Samgongan er í veruleikanum enn líka grundleggjandi ósamd, sum hon var í farnu viku. Høgni Hoydal heldur fast við, at tað er neyðugt at leggja eitt uppskot um ein leist fram at fullveldinum fyri tingið, og hann heldur tað eisini vera neyðugt at tingið staðfestir sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, vil ikki, at tingið skal staðfesta sjálvsavgerðarrættin. Hann heldur, at tingið ikki skal staðfesta nakað, sum er sjálvsagt. Harafturat heldur løgmaður tað vera vandamikið at skula staðfesta sjálvsavgerðarrættin í tinginum. Hann er nevniliga bangin fyri, at allir tinglimir ikki atkvøða fyri. Og hetta metir hann sum eina gølu, tí hann metir sjálvsaavgerðarrættin líka sjálvsagdan, sum dagin í dag.

Eftir útmeldingunum seinastu dagarnar at døma, er løgmaður heldur ikki serliga glaður fyri ein bundnan sjálvstýrisleist, sum skal enda við eini fólkaatkvøðu um at staðfesta fullveldið í 2012. Hetta hóast hann sjálvur kunngjørdi ein slíkan á tíðindafundi fyri einum mánaði síðani.

Løgmaður gjørdi í kjaksendingini leygarkvøldið greitt, at hann vil hava uppskotini snikkað soleiðis til, at samgongan ikki aftur kann koma í trupulleikar av, at Poul Nyrup Rasmussen enn einaferð meldar út, at vit bert fáa fýra ára skiftistíð.

Tí er nógv, sum skal fást upp á pláss hesa vikuna, skal samgonguni vera lív lagað.

## Hóttir við sliti

Høgni Hoydal segði í kjaksendingini, at hann metir samgonguna sum slitna, koma uppskotini ikki fyri tingið í hesi vikuni. Tí koma uppskotini ikki fyri tingið, er fullveldismálið steðgað upp og samgonguskjalið sostatt brotið.

Og vandin fyri, at uppskotini ikki koma í tingið er stórur.

Freistin fyri framløgum er úti hesa tingsetuna. Tí skulu 17 undirskriftir savnast fyri einum uppskoti, áðrenn tað kann leggjast fyri tingið. Men hóast 18 tinglimir eru í samgonguni, er ikki vist, at 17 fáast at skriva undir, orsakað av nógva stríðnum seinastu tíðina. Og roknast kann ikki við, at undirskriftir fáast frá andstøðuflokkunum.

Men tað er heldur ikki vist, at tað yvirhøvur eydnast at finna nakra semju, so nakað uppskot kann koma fyri tingið. Samgongan hevur nevniliga heilt mist stevið eftir maktstríðið millum Anfinn Kallsberg og Høgna Hoydal.

Tað hjálpir helst ikki um støðuna, at Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum alment fanst harðliga at løgmanni á fólkafundinum leygardagin, og at Fólkaflokkurin seinastu tíðina hevur fríggjað nógv til Javnaðarflokkin.

## Stórar avbjóðingar

Eydnast tað hóast alt at finna eina semju í samgonguni um ríkisrættarligu støðuna, er kortini ivasamt, hvussu væl samgongan fer at arbeiða saman í øðrum málnum. Álitið millum flokkarnar er burtur, og tí kann ikki roknast við, at teir náttúrliga stuðla hvørjum øðrum í øðrum málum.

Harafturat standa avbjóðandi lønarsamráðingar fyri framman í vár, sum fara við nógvari tíð og orku, samstundis sum fólkið fer at leggja trýst á politikararnar.

Oman á tað heila hevur trúvirðið hjá samgonguni helst fingið eitt rættuligt skot fyri bógvin.

Fyri ikki so langari tíð síðani lovaði samgongan føroyingum føroyskt fullveldi. Men tað, sum kom burturúr, var ógvusligt innanhýsis klandur.

Anfinn Kallberg hevur óteljandi ferðir trinið fram og lovað føroyingum suverenitet, men fyri viku síðani sýtti hann fyri, at farast skuldi undir ætlanina fram ímóti suverenitetinum, sum samgongan boðaði frá 1. februar. Í staðin legði hann fram nýtt uppskot við øktum sjálvstýri fyri eygað.

Høgni Hoydal hevur havt fullveldi sum einasta mál øll hesi trý árini, hann hevur verið landsstýrismaður. Men leygardagin valdi hann at taka uppskot síni um ein leist fram at fullveldinum aftur, fyri at bjarga samgonguni.

Høgni Hoydal viðurkendi leygardagin, at hann hevði mist andlit.

Men tað er ikki bert Høgni Hoydal, ið hevur mist andlit. Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur eisini mist stóran part av sínum trúvirði.

Skulu vit geva eitt boð um, nær stríð aftur tekur seg upp í samgonguni, skjóta vit, at tað verður innan ein vika er liðin.



# Uppskotið er samgonguuppskot

**Sjálvstýrisleisturin, sum Høgni Hoydal ætlaði at leggja fyri tingið leygardagin, er ein ætlan, sum samgongan hevur arbeitt við, síðani fullveldissamráðingarnar slitnaðu 26. oktober í fjør**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

Lógaruppskotið um fullveldistilgongdina var ikki eitt uppskot frá Høgna Hoydal ella frá Tjóðveldisflokkinum.

Uppskotið, sum Høgni Hoydal eftir hart trýst og hóttanir frá løgmanni bað løgtingsformannin taka aftur leygardagin, var sambært Høgna Hoydal eitt uppskot, sum landsstýrið hevur viðgjørt út í æsir síðani 26. oktober í fjør, tá fullveldissamráðingarnar við danir slitnaðu.

Uppskotið snúi seg um at yvirtaka øll málsøki uttan ríkismál eftir einum føstum leisti eitt ávíst áramál, minka blokkin samsvarandi, seta á stovn ein búskapargrunn og at fólkaatkvøða skal haldast um suverenitetin, tá allar bindingar eru burtur.

Hetta er tað sama, sum løgmaður longu 2. november í fjør boðaði frá í tíðindaskrivi um nýggjan sjálvstýrisleist. Leisturin varð útgreinaður á tíðindafundi í Tinganesi 1. februar í ár.

Á tíðindafundinum kunnaði løgmaður saman við Høgna Hoydal og Helenu Dam á Neystabø um, at landsstýrið hevði gjørt av, at Føroya fólk á fólkaatkvøðu 26. mai skuldu spyrjast, um tey tóku undir við eini løgtingslóg við fýra ásetingum.

Fyrsta ásetingin segði, at øll málsøki verða eftir einari skipaðari ætlan løgd undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 2012.

Onnur ásetingin segði, at ein búskapargrunnur verður settur á stovn, ið skal tryggja Føroyum eina trygga skiftisskipan frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap.

Triðja ásetingin segði, at heildarveitingin úr Danmark verður minkað eftir einari skipaðari ætlan, til hon er burtur.

Og fjóðra ásetingin segði, at fólkaatkvøða verður um at skipa Føroyar sum fullveldisríki í seinasta lagi 2012.

Lógaruppskotið, sum Høgni Hoydal ætlaði at leggja fyri tingið innihelt hesar fýra ásetingar, men hann hevði tikið fólkaatkvøðuna 26. mai burturúr, tí løgmaður hevði boðað frá, at hvørki hann ella Fólkaflokkurin kundi taka undir við fólkaatkvøðuni eftir at Nyrup hevði meldað út, at eitt ja fór at merkja fýra ára skiftistíð.

Men uppskotið um sjálvsavgerðarætt var samgongan ikki samd um at leggja fyri tingið. Hetta uppskotið lat Høgni Hoydal Løgtingsskrivstovuni uttan at hava samgonguna aftan fyri seg.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, ásannar, at mongu útmeldingarnar og ósemjurnar í samgonguni hava verið óhepnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Torført at meta um trúvirði

**Løgmaður ásannar, at nógvu og ymsu útmeldignarnar hjá samgognuni hava verið óhepnar. Men hann heldur tað vera torført at meta um, hvørja ávirkan hetta hevur havt á trúvirðið hjá samgonguni**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

Anfinn Kallsberg vónar, at Føroya fólk enn trýr uppá fullvelisætlanina.

Men hann ásannar, at stríðið í samgonguni, saman við nógvu og ymsu útmeldingunum seinastu tíðina, hevur verið óheppið.

Hóast tað eydnaðist løgmanni at fáa Høgna Hoydal at bakka og taka uppskot síni aftur, ivast Anfinn Kallsberg í, um hetta var ein politiskur sigur fyri hann.

– Eg veit ikki, um hetta kann kallast ein politiskur sigur. Men tað eru nakrar spælireglur, vit skulu halda okkum til, og tað er tað, vit hava gjørt, segði Anfinn Kallsberg við Sosialin beint eftir framløgutingfundin leygardagin.

Veljarakanningin, sum Útvarpið og Dimmalætting almannakunngjørdu 8. februar sýndi, at 57,7 prosent av teimum føroyingunum, sum høvdu tikið støðu, høvdu atkvøtt nei á ætlaðu fólkaatkvøðuni 26. mai um ein bundnan leist fram at fullveldinum. Og var tað hendan veljarakanningin, ið gjørdi, at løgmaður ikki longur ynskti nakra fólkaatkvøðu.

Sosialurin spurdi eftir lagnutingfundin leygardagin løgmann, hvat úrslit hann hevði væntað á eini fólkaatkvøðu nú, eftir alt samgongustríðið.

– Tað hevði komið ann uppá, um fólkaatkvøðan varð hildin við grundarlag í føroyskum ella donskum treytum. Men eg veit ikki, var stutta viðmerkingin frá einum sjónliga troyttum løgmanni.



*Høgni Hoydal stendur fast við, at uppskotið um sjálvstýrisleist skal leggjast fyri løgtingið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fullveldið skal fyri tingið

**Høgni Hoydal krevur av samgonguni, at fullveldisuppskot hansara koma fyri tingið í hesi vikuni. Annars eru eingi fullveldismál og eingin samgonga, staðfestir hann**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

Fullveldisuppskotini hjá Høgna Hoydal skulu fyri tingið, skal samgonguni vera lív lagað.

Hetta gjørdi Høgni Hoydal greitt eftir tingfundin leygardagin, tá hann eftir hart trýst og hóttarni frá løgmanni valdi at missa andlit og tók aftur uppskot síni um sjálvstýrisleist og at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

– Nú má tað standa sína roynd, um samgongan vil skriva undir uppá at fáa fullveldismálið fyri tingið og fáa tað samtykt. Annars er einki fullveldismál, staðfesti Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal segði, at hann næstu dagarnar fer at vita, um hann kann fáa eina váttan frá samgonguni um at fáa málini fram, og at samgongan kann halda seg til tað, sum er avtalað.

## Trupul avgerð

Høgni Hoydal sigur, at avgerðin at taka uppskot síni aftur er nógv truplasta avgerðin, hann nakrantíð hevur tikið.

– Eg valdi at missa andlit, heldur enn at missa sjálvstýrismálið.

– Hevði eg lagt uppskotið fyri tingið í dag, hevði samgongan og fullveldismálið rokið. Tí mátti eg lata vera við at leggja tað fram fyri yvir høvur at bjarga fullveldismálinum, sigur Høgni Hoydal.

Men uppskotið hjá Høgna Hoydal liggur klárt á borðinum, hóast løgtingsformaðurin ikki hevur lagt tað fram. Og næstu dagarnar ætlar Høgni Hoydal at vita, um samgongan vil halda síni lyfti og fáa uppskotið fyri tingið. Annars metir Høgni Hoydal samgonguna sum slitna.

Høgni Hoydal ætlar ikki, at samgongan enn einferð skal brúka vikur uppá at telva seg fram til ein nýggjan leist og eina nýggja útmelding í spurninginum um Føroyskt fullveldi.

– Eg havi fingið at vita, at innihaldið í uppskotinum er í lagi. Tað er bara framferðarhátturin, sum tað hevur verið galið við, sigur Høgni Hoydal.